# Hurðin gongur títt í FCK

**Eftir at felagið hjá Toda Jónsson hevur keypt ein tann besta vongverjan í superliguni, siga teir seg leita eftir einum góðum álopsspælara**

ÚTISETAFELAG
*Jóannes Hansen*

Í hesum døgum verður síðsta hondin løgd á fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið í superliguni. Fyrsta umfarið í landskappingini verður annað vikuskifti, og smátt um smátt fer at síggjast, hvussu venjararnir ætla, at teirra lið skulu síggja út.

Samansetta liðið millum Ikast og Herning, FCM, fyrireikar seg eisini, men í fyrradagin varð tað greitt, at ein tann besti maðurin hjá teimum verður komandi kappingarár ikki á teirra liði, men á einum av mótstøðuliðunum. Talan er um vinstra vongverjan Urmas Rooba, sum felagið hjá Toda Jónsson, FCK, keypti.

Alment er ikki upplýst, hvat keypsprísurin var, men donsku fjølmiðlarnir halda seg vita, at FCK hevur rindað fimm milliónir til FCM fyri spælarar, sum nú er bundin at FCK inntil 30. juni í 2007.

Har du penge, så kan du få, men har du ingen, så må du gå, verður sagd í einum donskum barnasangi, og soleiðis er tað. FCK eigur nógvar pengar, og hevur tískil møguleika at keypa teir spælararnar, sum teir vilja hava. Sum hjá so mongum øðrum feløgum, so er ikki so nógv í kassanum hjá FCM. Í staðin fyri at góði vongverjin fer fyri einki, tá sáttmálaskeiðið hjá honum og felagnum er liðugt, hava teir nú fingið fimm milliónir, og so fáa teir sín part, um hann verður seldur víðari frá FCK.

Hesin Urmas Rooba er estlendskur landsliðsspælari. Hóast hann bara er 24 ára gamal, hevur hann spælt 41 landsdystir, og hann kemur upprunaliga úr Florin Talinn, sum eigur flestu spælararnar á landsliðnum – um teir ikki eru farnir úr felagnum og til útlendsk feløg. Tað eru tvey ár síðani, at Urmas Rooba varð seldur úr Florin Talinn og til FCM.


*Estlendingurin Urmas Rooba er seinasti keypið hjá FCK*

– Vit hava saknað kvalifiseraðar eykamenn til vongverjarnar, tá skaðar og leikbann gera seg galdandi. Nú hava vit fingið ein tann besta í SAS liguni. Hóast hann bara er 24 ára gamal hevur hann stórar altjóða royndir, sigur Niels–Christian Holmstrøm, ítróttarstjórin í FCK.

At FCK júst nú hevur keypt ein vinstra vongverja afturat kemst av, at Peter Christiansen, sum hevur átt plássið, síðani Niclas Jensen varð selur til Manchester City, framvegis er knæskaddur. Hann varð skurðviðgjørdur, tá kappingarárið var liðugt fyrst í mai, men tað hevur ikki tikið seg væl upp, og nú verður roknað við, at hann skal á borðið eina ferð afturat.

### Styrkja allar keturnar

Tá Hans Backe fyrr í ár gjørdist venjari í FCK, segði hann seg rokna við, at tað fór at verða neyðugt at keypa nýggjar spælarar til allar keturnar á liðnum. Fyri nøkrum vikum síðani keypti FCK miðvallaran Peter Nielsen úr Borussia Mönchengladbach, og teir siga seg ætla at keypa ein álopsspælara eisini:

– Vit halda ikki, at tað er akutt, men vit fylgja alla tíðina við, og um vit fáa eyga á ein spælara, sum vit halda er góður til okkara lið, so fara vit at keypa hann, sigur FCK venjarin.

Harvið leggur hann upp til, at m. a. Todi Jónsson kann koma í uppaftur størri kapping um pláss í FCK álopinum, enn hann higartil hevur verið í. Men tað kann eisini hugsast, at FCK ætlar at sleppa sær av við onkran álopsspælara.

Í gjárkvøldið skuldi FCK spæla venjingardyst í Helsingør ímóti Sheffield Wednesday. Todi var ikki í 17 manna hópinum, tí hann hevði onkrar trupulleikar í øklunum. Peter Møller var heldur ikki við, tí hann fekk ein snudd í høvdið, tá FCK leygardagin spældi í Oslo.

Fyrsti málverjin hjá FCK, Magnus Kilhlstedt, var heldur ikki í hópinum. Hann hevur síðstu vikurnar havt trupulleikar í lærinum. Hetta var orsøkin til, at hann heldur ikki var við í Oslo. Tað ljóðar annars í donsku og svensku pressuni, at málverjin kanska er á veg burtur frá FCK. AIK í Stokholm kann ikki semjast við málverjan, Daniel Andersson, um nýggjan sáttmála. Tí verður roknað við, at svenska høvuðsstaðarfelagið fer at skifta venjara, tá hetta kappingarárið verður liðugt í heyst. Svensk bløð siga seg rokna við, at AIK fer at keypa Magnus Kihlstedt, og felagið sigur, at teir hava hugsað um FCK málverjan.

Í FCK hava teir ongar viðmerkingar. Høvuðspersónurin sigur seg vera gladan, tí tað eru onnur, sum hugsa um hann, men hann staðfestir, at tað eru tvey ár eftir av sáttmálaskeiðnum millum hann og FCK, og at hann fer at halda seg til sáttmálan.

# Renning á vestanstevnu

TÍÐINDASKRIV


*Vinnarnir í bólkinum dreingir yngri enn 13 ár, Robin Jónson t.v. nr 2, og vinnarin Jákup Øssurson Mohr t.h*
*Mynd Øssur Mohr*

**Menn (15km)**

| Tíð | Navn |
|---|---|
| 51,40 | Bogi Lenvig |
| 54,26 | Mark Remmy Sali |
| 54,42 | Guttorm Sørensen |
| 55,24 | Carsten Højbrye |
| 55,36 | Snorri Patursson |
| 55,43 | Cecil Weihe |
| 57,40 | Jonhard Larsen |
| 58,10 | Bogi Joensen |
| 61,40 | Sølvi R. Hansen |
| 62,58 | Jóhan Pauli Johansen |
| 64,58 | Jósvein Herup Olsen |
| 67,49 | Steintór Hjaltalin |
| 68,36 | Jákup A. Berg |
| 69,06 | Robert Vilhelmsen |
| 78,45 | Jens Mikkelsen |

**Kvinnur (15km)**

| Tíð | Navn |
|---|---|
| 62,40 | Rigmor N. Arge |
| 63,04 | Borgarhjørt Holm |
| 75,45 | Diana Reynstind |
| 81,45 | Ingrid Patursson |
| 83,20 | Brindis R. Weihe |
| 87,46 | Sólfríð Fjallsbak |

**Gent. -7 (km)**

| Tíð | Navn |
|---|---|
| 2,22 | Elin D. Hansen |
| 2,27 | Anna Jákupsdóttir |
| 2,39 | Jórunn Hansen |
| 2,52 | Tórun Joensen |
| 2,56 | Sóleyg Johannesen |
| 3,34 | Kristina Mouritssen |

**Drein. -7 (km)**

| Tíð | Navn |
|---|---|
| 2,06 | Regin Joensen |
| 2,12 | Tummas N. Arge |
| 2,14 | Páll R. Weihe |
| 2,16 | Jóanis Albert |
| 2,20 | Ólavur Joensen |
| 2,26 | Jógvan Hans Jacobsen |
| 2,38 | Steingrímur Hallsson |
| 2,59 | Bogi Larsen |
| 3,32 | Tóri Nielsen |
| DNF | Betuel R. Hansen |
| DNF | Fríði Joensen |
| DNF | Tróndur Olsen |
| DNF | Gilli Reynstind |

**Gent. -10 (_km)**

| Tíð | Navn |
|---|---|
| 1,52 | Maria Holm Lund |
| 1,52 | Elspa D. Hansen |
| 1,53 | Vár Gregersen |
| 1,55 | Maria Samuelsen |
| 1,57 | Hildur á Plógv |
| 1,58 | Helena G. Jacobsen |
| 2,00 | Kirstin Hansen |
| 2,12 | Durita Poulsen |
| 2,14 | Guðrið G. Eystberg |
| 2,23 | Linda Thomsen |
| 2,37 | Linda Christiansen |
| 2,42 | Elin Maria Christiansen |
| 2,53 | Eva Nattestad |

**Drein. -10 (_km)**

| Tíð | Navn |
|---|---|
| 1,40 | Rógvi Egilstoft Nielsen |
| 1,47 | Sigmund Olsen |
| 1,47 | Jóhann á Plógv Hansen |
| 1,56 | Pætur Joensen |
| 2,06 | Andrias Reinert Hansen |
| 2,06 | Ólavur Larsen |
| 2,07 | Tummas Sigvardsen |
| 2,09 | Hans Otto Samuelsen |
| 2,12 | Bárður Leonson |
| 2,16 | Hugin Bjørnson Knudsen |
| 2,22 | Teodor Larsen |
| 2,23 | Ellindur Erlingson |
| DNF | Dia Reynstind |

**Gent. -13 (1km)**

| Tíð | Navn |
|---|---|
| 3,40 | Marin í Dali |
| 3,59 | Jenny Svabo |
| 4,37 | Anetta Ejdesgaard |
| 4,55 | Susan Johannesen |
| 5,02 | Eyð Joensen |
| 5,03 | Christa R. Weihe |
| 5,14 | Ronja á Plógv |
| 5,43 | Marta Næs |

**Drein. -13 (1km)**

| Tíð | Navn |
|---|---|
| 3,33 | Jákup Øssurson Mohr |
| 3,40 | Robin Jønsson |
| 3,41 | Álvur F. Christiansen |
| 3,55 | Jan Elmar Sørensen |
| 4,04 | Helgi Joensen |
| 4,15 | Oluf Dam |
| 4,16 | Pauli Øssurson Mohr |
| 4,27 | Høgni L. Svabo |
| 4,29 | Jefri Jørgensen |
| 4,31 | Ragnar á Presttrøðni |
| 4,36 | Andrias Nielsen |
| 4,41 | Ólavur á Sæbonki Hansen |
| 4,50 | Ragnar í Soylum |
| DNF | Jan Sigurd á Plógv |

**Gent. -17 (1km)**

| Tíð | Navn |
|---|---|
| 3,34 | Esther Rasmussen |
| 3,40 | Sarita Hansen |
| 4,22 | Maria í Skorini Jacobsen |

**Drein. -17 (1km)**

| Tíð | Navn |
|---|---|
| 3,03 | Tróndur Kragesteen |
| 3,06 | Jóan Karl Joensen |
| 3,48 | Jón Gregersen |


*Bogi Lenvig vann aftur á Vestanstevnu, og er langt fremstu í samanløgdu støðuni*
*Mynd: Øssur Mohr*




## Sølumaður

Vit soknast eftir álítandi sølumanni.
Arbeiðið umfatar sølu og útkoyring úr ísbilinum og krevst tí tað stóra koyrikortið.

Vit krevja ikki at tú hevur eina stóra útbúgving, men hinvegin krevja vit at tú hevur lætt lyndi, dugir at umgangast fólki og er opin fyri nýggjum avbjóðingum.

Tú verður ein partur av einum sølubólki, sum eru við til hjálpa tær at selja og marknaðarføra ísar, góðgæti og keks, kring allar oyggjarnar.

Tú kanst byrja beinavegin, men vit bíða eisini fegnir eftir tær. Løn sambært avtalu við okkum.

Skrivlig umsókn verður at senda til P/F Damfar, Postboks 268, 110 Tórshavn.

Hevur tú hug at hoyra meira um hetta spennandi starv, vinarliga ring til okkara og spyr eftir Benny Ejdesgaard, telefon 219977

Damfar
Niels Finsensgøta 5
Postbox 154 · 110 Tórshavn
Tlf. 35 90 77 · Fax 35 90 60
e-mail: damfar@post.olivant.fo

P/F Fóm

Mentamálaráðið

## Bókhaldari

**Starvio**
í sambandi vio at eitt av okkara starvsfólkum fer í annao starv, er eitt nyskipao starv leyst at søkja sum bókhaldari í Mentamálaráonum.
Starvio er skipao sum sjálvstøougt starv í fyrisitingardeildini.

Høvuosuppgávurnar eru m.a.:
- Kontering, bókhald, figgjarstyring og eftirlit vio rakstrarstøoum
- At nyta teir figgjarstyringsmøguleikar, io finnast í Búskaparskipan Landsins og menna slík amboo
- Luttaka í gero av sundurgreiningum og langtíoarætlanum
- Málsviogero

**Førleikakrøv**
Vit vænta okkum m.a., at umsøkjarar hava
- Eina fyri starvio viokomandi útbúgving og royndir á hesum fakøkinum, t.d. HH, merkonom, HD ella javnbjóois útbúgving
- Áhuga fyri figgjarstyring og fyrisiting
- Fyrikomandi og góo samstarvsevnir
- Evnir at kunna arbeioa sjálvstøougt, og eisini í bólkum

**Vit bjóoa**
- Eitt starv har tú sjálv/sjálvur kanst veroa vio til at skapa starvio
- Starvio er spennandi vio skiftandi uppgávum og vio samskifti úteftir
- Skeio og eftirútbúgvingarmøguleikar

Arbeioio verour á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæoi persónligari og fakligari menning eru góoir.

Tú kemur at arbeioa í einum spennandi umhvørvi vio skiftandi uppgávum tætt saman vio starvsfólkunum í Mentamálaráonum og stovnum tess.

**Setanar- og lønartreytir**
Starvio verour sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðio og viokomandi yrkisfelag.

Viomerkjast skal, at setanarøkio fevnir um landsstyrismálaráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir tess.

**Umsókn**
Umsókn vio prógvum o.a skulu sendast til:

Mentamálaráoio
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. juli 2002, kl. 15.00.
Starvio verour at seta skjótast tilber.

Um tú ynskir fleiri upplysingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aoalstjóra í Mentamálaráonum á tlf. 35 50 50.

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Mentamálaráðið er skipað í tríggjar deildir - Mentamáladeild, Fólkaskúladeild og Vinnu- og miðnámsskúladeild umframt einari fyrisitingardeild.
Í **Fyrisitingardeildini** eru 12 starvsfólk, har er lønarstova, próvstova, móttøka, skjalagreiðsla og húsavørður umframt ein komandi bókhaldsstova. Fyrisitingardeildin er skipað við einum fyrisitingarleiðara, ið vísir til aðalstjóran.

## Tvingsilssøla

**Hósdagin 22. august 2002 kl. 9.00** verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøtu 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 41, Øravík.**

Ognin er eitt neyst í »Punthavnini«, til støddar 4 x 12 m. Eingin vegur er til neystið.

Sølan er umbiðin av **Ólavur Jákup Kristoffersen, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145,** e-mail ojk@advlaw.fo **(j.nr. 20020228)**, sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

**Føroya Fútarættur,**
*tann 15/7-02*

## Tvingsilssøla

**Hósdagin 22. august 2002, kl. 9.30** verður á dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, hildin tvingsilssøla yvir **matr. nr. 61h, Sandavágur.**

Ognin er einisethús til støddar 144 m² í stovu og loftshædd við tilbygdum kjallararúmi og hjalli 20 m². Húsini eru gjørd av timbri og betong og takt við decramastik. Í stovuhæddini er durur, gongd, grovkøkur, køkur, stova, 3 kamur, stórt baðirúm og hjúnarkamar við lítlum baðirúmi. Loftið er óinnrættað.

Sølan er umbiðin av **Ólavur Jákup Kristoffersen, advokati, Fr. Petersensgøtu 9, Tórshavn, tlf. 311145,** e-mail ojk@advlaw.fo **(j. nr. 20020231)**, sum kann geva nærri upplýsingar, og sum nærri avtala kann gerast við, um ynskt verður at síggja ognina.

Føroya fútarættur,
tann 17. juli 2002




## Fólk søkist

Vegna vaksandi virksemi søkja vit eftir fólki til servering, í skiftandi vaktum.

Løn eftir avtalu.

**Pizzaria Napoli**
Klaksvíksvegur 45
FO-700 Klaksvík
Tlf. 455128/229064

## Summarfrí

Vegna summarfrí er skrivstovan stongd frá 22. juli til 12. august.
Átrokandi boo veroa avgreidd á 225346.
Vit ynskja vioskiftafólki okkara eitt gott summar.

**P/F Byggifelagio G.Waagstein**

## Summarfrí

Vegna summarfrí eru Bilverkstaðið og Daewoo-eykalutagoymslan stongd frá 22. juli. Opið verður aftur 19. august.

**P/F Esmar Simonsen**
Kambsdalur
530 Fuglafjørður
tlf. 444405 · fax. 444629

## Summarfrí

Vegna summarfrí er skrivstovan stongd frá 22. juli til 12. august.
Átrokandi boo veroa avgreidd á 225410.
Vit ynskja vioskiftafólki okkara eitt gott summar.

**P/F ALMA Maskinverkstaour & Smioja**

Sosialurin -tað loysir seg

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo